

# Faroe Petroleum lógvatak saman við teimum stóru

**Jan Müller**

16.03.2014 - 19:37

Oljan.fo

**Hóast tað ikki telist millum oljurisarnar, so er greitt, at oljufelagið Faroe Petroleum, sum hevur røtur í Føroyum, er við til at taka stór tøk í oljuleitingini á norska landgrunninum.**

**Felagið er vorðið sera virkið í Norra seinastu árini og hevur útvegað sær nógv loyvi umframt at vera partur av fleiri týðandi boringum.**

**Ein av seinastu væleydnaðu brunnunum er Butch, har felagið hevur rakt við olju. Nú er felagið saman við oljufelagnum Centrica og øðrum feløgum í ferð við at bora ein**

**sonevndan síðusporbrunn á Butch leitimiðinum. Um henda boringin vísir seg at vera eins positiv, sum hildið er, so verður farið undir at bora ein framleiðsluroyndarbrunn.**

Endamálið við boringunum er at gera sær eina mynd av øllum økinum á Butchleiðini og taka eina avgerð um møguliga útbygging. Centrica er fyristøðufelag við 40%, Suncor hevur 30%, Faroe Petroleum 15% og Tullow Oil 15%.

Oftani verður nevnt, at Faroe Petroleum er eitt føroyskt felag. Sambært roknskapinum hjá samtakinum er felagið enskt við heimstaði í Skotlandi. Felagið hevur eitt dótturfelag við skrivstovu í Føroyum, men her er einki virksemi. Felagið, sum luttekur í seismiskum kanningum í Barentshavinum, er norska dótturfelagið